Skipafelagið Føroyar er tað størsta og elsta skipafelagið í Føroyum við umleið 200 starvsfólkum um borð á skipunum og á teimum fýra føroysku deildunum. Skipafelagið varð stovnað í 1919.

Í oktober 2004 løgdu Skipafelagið Føroyar og Eimskipafelag Íslands saman í eitt felag. Skipafelagið Føroyar og Eimskip hava verið marknaðarleiðandi hvør á sínum heimamarknaði í langt áramál.

Í Eimskipafelag Íslands starvast í dag áleið 1.500 starvsfólk við hollum kunnleika til flutning og við góðum sambondum um allan heim. Eimskipafelag Íslands rekur í dag 50 skrivstovur í 15 londum.

Eimskipafelag Íslands er partur av Avion Group, sum er størsta flutningsfyritøka í Íslandi og í Norðuratlantshavi. Avion Group, sum hevur høvuðsmiðstøð í Íslandi, varð nýliga mett at vera hin næstskjótast vaksandi fyritøkan av teimum 500 størstu fyritøkunum í Evropa (Europe's 500).

# Vilt tú seta teg á ovastu rók

í einum av framfýsnastu fyritøkunum í Evropa

Á Skipafelagnum Føroyar hevur Árni Joensen í sløk 30 ár staðið við stýrisvølin, men nú er stundin komin, at Árni ynskir at fáa betri stundir til eisini at røkja onnur áhugamál.

Leitað verður tí eftir einum framfýsnum, ábyrgdarfullum og dugnaligum persóni til starvið sum stjóri í P/F Skipafelagnum Føroyar.

**Starvið**
Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Skipafelagnum Føroyar við tilvísing til nevndina.

Eitt starv í einum samtaki sum Avion/Eimskip kann fyri tann rætta persónin eisini skapa møguleikar fyri, at hann sleppur at royna seg í altjóða arbeiði, um áhugi er fyri tí.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til vinnu- og búskaparlig viðurskifti í Føroyum
- hevur góð samstarvsevni og leiðsluroyndir
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at málbera seg í skrift og talu (á føroyskum og enskum)

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til **Rasmussen & Weihe, statsaut. revisorar, postboks 30, FO-110 Tórshavn** í seinasta lagi fríggjadagin 17. mars 2006

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Klaus Rasmussen á telefon (+298) 351 700.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SKIPAFELAGIÐ

Eystara Bryggja · 110 Tórshavn · www.faroeship.fo

# Stuðlar til Stuðulsskipanina fyri vaksin

Stuðulsskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktar-uppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

**Stuðulskipanin fyri vaksin søkir stuðul, ið m.a.:**

- kann arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans og samstundis eisini kann átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión
- vísir áhuga og virðing og samstundis er professionellur
- er stuðlandi og hjálpir brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- er sterkur – bæði til likams og sálar
- kann handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

Søkt verður eftir stuðli til:

**Vágar:**
**Kvinna við ALS - Vøddasvinn.**
Talan er um eitt starv uppá 33 tímar um vikuna í skiftandi vaktum at byrja 01.04.2006

**Suðuroyar sunnara helvt:**
**Søkt verður eftir stuðli/um til at arbeiða við 2 brúkarum:**
**Kvinna við Scelerosu:** Uppgávurnar eru m.a. at stimbra henni í teimum dagligu uppgávunum í heiminum og at fáa ein innihaldsríkan dagligdag. Talan er um 6 tímar um vikuna. Byrja verður eftir nærri avtalu.

Maður við menningartarni: Uppgávurnar eru m.a. at stimbra honum í gerandisdegnum og at fáa ein innihaldsríkan dagligdag. Talan er um 4 tímar um vikuna. Byrja verður eftir nærri avtalu.

**Freistin at søkja øll størvini er 15. mars 2006**

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um starv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi dag-, kvøld, og vikuskiftisarbeiði.
Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita hjá ergoterapeutiskum ráðgeva, Einu Andreasen á tel. 354020.

Umsóknir saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Att.: Oda Johansdóttir
Løkjatún 1, Fo –160 Argir

**Heimarøktin & Serforsorgin**
**Stuðulskipanin fyri vaksin**
Løkjatún 1 · FO -160 Argir, Tlf. 354020 - Telefax 354021

# Arbeiðsfólk

**Vit sóknast eftir fólki at arbeiða í skiftandi vaktum, frá 1. mars. 18 ára aldursmark.**

Café - in
við Streymin

**tel 422 033**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4184**
**Navn:** Sp/f Varmakelda
**Adressa:** 512 Norðragøta
**Kommuna:** Gøtu
**Stovningardato:** 20-02-2006
**Viðtøkudato:** 20-02-2006
**Stovnarar:**
Janus Joensen, 512 Norðragøta
**Stjórn:** Janus Joensen, 512 Norðragøta, (stjóri)
**Grannskoðari:**
Sp/f Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, skrás.grannsk, J.Broncksgøta 16, Box 16, 110 Tórshavn
**Partapeningur:**
kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kr. 80.000,00 í ørðum viðrum til kurs 100.
**Tekningarreglur:**
Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Endamál:**
Endamál felagsins er at reka mjólkarframleiðslu, keyp og sølu og virksemi, sum knýtir seg til raksturin av festi og annað virksemi í hesum sambandi.
**Roknskaparár:**
01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:**
20.02.2006 - 31.12.2006

*Skráseting Føroya tann 21. februar 2006*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 4068,**
P/F JBG Íløgufelag, 100 Tórshavn.
**Nevnd:**
**Farin frá sum nevndarformaður:**
Sverri Martin Nysted Hansen, Brúarás 11, 111 Reykjavík
**Innkomin sum nevndarformaður:**
Heini Fosaa, J. Broncksgøta 1, 100 Tórshavn
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:**
Heini Fosaa, J. Broncksgøta 1, 100 Tórshavn
**Innkomin sum stjóri:**
Jørmann Petersen, Guttormsgøta 8, 188 Hoyvík

*Skráseting Føroya tann 24. februar 2006*

*Kristin Balle*

# Frá Bóndafelagnum

**Aðalfundur** felagsins verður í Búnaðardeplinum leygardagin 18. mars 2006 kl. 11.00.

**Skrá:** Sambært lógum felagsins.

**Formaðurin**

# Aðalfundurin

hjá Ferðavinnuni í Eysturoynni verður **týsdagin 14. mars 2006 kl. 19.00 í Skúlanum á Eiði.**

Skrá sambært viðtøkum.



**Skal tú hava andlitsmyndir?**

Kom inn í 3-arin og hoyr nærri

ella ring 35 35 35

3arin